# FCK misti í fyrsta takinum

**Tveir nýggir OB spælarar vóru skarprættarar, tá ið oddaliðið, sum ikki hevði Toda Jónsson í ferðalagnum, varð sett upp á pláss**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*



Tað kennist eitt sindur undarligt. FCK hevur seks tey seinastu árini treytaleyst verið felagið í superliguni hjá fótbóltshugaðum føroyingum. Soleiðis hevur tað sjálvandi verið, tí Todi Jónsson hevur verið partur av felagnum, og hann hevur verið týðandi partur av liðnum.

Todi Jónsson fær framvegis fasta løn í FCK. Men í løtuni fær hann ikki loyvi at vísa síni kynstur á vøllinum. Og so er tað einki at liggja omaná, at viðferðin, sum leiðslan í felagnum nú í vetur og í vár hevur givið Toda, hevur við sær, at føroysku kenslurnar fyri FCK í løtuni ikki eru heilt tær somu, sum tær hava verið. Men tað kann so skjótt broytast. Avrikið sunnudagin boðaði ikki frá, at FCK eigur sannførandi álopsspælarar, og hóast Todi í løtuni tykist vera úti í kuldanum, so kann tað vera so skjótt, at hann aftur verður á vøllinum.

Undan 19. leikumfarinum var FCK níggju stig undan kappingarneytunum. Nú er munurin minkaður til seks stig. FCK er framvegis stórfavorittur at vinna meistaraskapin. Men møguleikin fyri, at spenningur skal koma í, nú tað resta fjúrtan umfør, er størri enn hann hevur verið. Eingin hevur gloymt, at tað í fjør var um reppið, at FCK fekk Brøndby aftur, hóast Brøndby í vetrarsteðginum var tíggju stig frammanfyri FCK.

### Nýggju gjørdu um seg

Tað var útselt í Odense sunnudagin. 16 túsund áskoðarar vóru á stadion, og tey flestu høvdu alla orsøk at vera í góðum hýri. OB vann 2–0 á FCK. Karim Zaza, sum í summar fer at flyta til Brøndby, var ein sannur brandur í OB málinum. Í FCK álopinum vóru Zuma og Peter Møller. Teir høvdu báðir góðar møguleikar, men tað eydnaðist ikki at fáa mál. Í 2. hálvleiki varð Jörgen Pettersson settur á vøllinum, men hjá honum eydnaðist tað heldur ikki.

Ofta vísir tað seg gagnligt hjá fótbóltsspælarum at skifta felag og harvið at fáa nýggjar avbjóðingar og ikki minst nýtt álit frá venjaranum. OB liðið sunnudagin var gott dømi um hetta.

Steffen Højer hevur leingi sitið á beinkinum í Viborg, og Thomas Lindrup, sum hevur stak gott fótbóltshegni, hevur ongantíð verið fastur maður í Brøndby. Í vetur eru báðir fluttir til Odense at spæla, og fyrsta royndin vísti, at tað hevur verið eitt gott hugskot. Steffen Højer skoraði fyrra málið. Hann kom ímillum, eftir at landsliðsmiðverjin hjá FCK, Martin Albrechtsen, hevði verið alt ov óskettin, tá ið hann royndi við høvdinum at leggja bóltin aftur til málverjan. Ungverksi Balazs Rabózcki, var í FCK málinum, meðan Magnus Kihlsted var á beinkinum. Miðskeiðis í 2. hálvleiki staðfesti Thomas Lindrup heimasigurin.

### AaB óvæntaðan stigamiss

Umframt Brøndby verður AaB roknað sum besta boðið upp á silvurmerkini og kanska at vera hóttan ímóti FCK. Sunnudagin hilnaðist tað ikki væl hjá Aalborg. Tað varð roknað við, at teir skuldu fáa øll stigini í Køge, men tað eydnaðist ikki. Nýggja felagið í superliguni, sum verður mett at vera gott boð upp á annað niðurflytingarplássið, megnaði 1–1, og tað var ikki undur í, at teir í AaB iðraðu seg.

FCM hevur verið væl við í kappingini higartil, og teir komu væl frá fyrsta umfarinum eftir vetrarsteðgin. Á heimavølli vunnu teir 2–0 á Esbjerg, sum neyvan fer at røkka plássi í europeisku kappingunum.

Silkeborg hevur staðið seg stak illa higartil, og tað hevur verið tosað um, at venjarin, Viggo Jensen, kanska fór at fáa sekkin. Men liðið kom væl frá fyrstu royndini eftir vetrarsteðgin. AB, sum stóð seg óvanliga væl í fimm teimum síðstu umførunum undan vetrarsteðginum, var í Silkeborg, og teir fóru aftur til Gladsaxe við 3–1 tapi.

Farum og AGF skuldu havt spælt í Farum. Men tann dysturin varð útsettur. Hóast góða várveðrið í Danmark síðstu dagarnar, so søgdu teir leygardagin, at tað framvegis er frost í einum lítlum parti av vøllinum í Farum.

**Fótbóltsstøður**

**Danska superligan**

| | d | v-j-t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 FC København | 19 | 11-5-3 | 30-18 | 38 |
| 2 Brøndby | 19 | 9-5-5 | 38-21 | 32 |
| 3 FC Midtjylland | 19 | 7-6-6 | 28-23 | 27 |
| 4 AaB | 19 | 8-3-8 | 26-28 | 27 |
| 5 Farum | 18 | 9-0-9 | 26-35 | 27 |
| 6 OB | 19 | 7-5-7 | 30-26 | 26 |
| 7 Esbjerg | 19 | 6-7-6 | 37-38 | 25 |
| 8 AB | 19 | 5-8-6 | 24-23 | 23 |
| 9 Køge | 19 | 7-2-10 | 31-41 | 23 |
| 10 AGF | 18 | 6-4-8 | 26-33 | 22 |
| 11 Viborg | 19 | 5-6-8 | 32-37 | 21 |
| 12 Silkeborg | 19 | 5-5-9 | 26-31 | 20 |

# Laudrup lítur á Jón Róa

**Fyri fyrstu ferð var ein føroyingur á besta Brøndby liðnum, tá ið Jón Rói Jacobsen leygardagin var vongverji í vinstru**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Michael Laudrup verður mettur at vera besti danski fótbóltsspælarin nakrantíð. Um hann hevur somu evni sum venjari er ikki greitt enn. Sum hjá Alex Ferguson í Manchester United miðskeiðis í níti árunum er setningurin hjá Michael Laudrup nú at byggja eitt nýtt lið upp heilt frá botninum av. Laudruð smæðist ikki við at geva ungum spælarum møguleikan. Venjarin vil hava góðar bóltspælarar á øllum plássunum á liðnum, og tað fekk føroyski landsliðsspælarin, Jón Rói Jacobsen, leygardagin ágóðan av.

Tað hevði ikki verið roknað við, at Jón Rói soleiðis beinanvegin skuldi fáa møguleikan á besta liðnum. Men í síðstu viku vóru ábendingar um, at venjarin hugsaði um møguleikan, at Jón Rói skuldi verða vongverji í vinstru. Aurelius Skarbalius, sum hevur verið fastur fúsur í hesum plássinum í fleiri ár, er skaddur. Teir báðir, Jón Rói og Auri, hava spælt landsdyst ímóti hvørum øðrum. Auri var liðformaður, tá ið Litava 12. oktober í fjør vann 2–0 á heimavølli ímóti Føroyum.

Jón Rói hevur ongantíð áður í týdningarmiklum dysti verið vongverji í vinstru. Hann var á vøllinum í 70 minuttir, og tá ið hann varð skiftur út, var Brøndby frammanfyri 2–0.

Í donsku fjølmiðlunum er tað eitt sindur misjavnt, sum teir halda um avrikið hjá føroyska Brøndby spælaranum. Í Politiken sigur fremsti fótbóltsmaðurin, Søren Olsen, at tað væl sást á avrikinum hjá Jón Róa, at hetta var fyrsta ferðin, at hann var við í superliguni. Politiken vil vera við, at tað var ikki frítt, at føroyski landsliðsspælarin hevði nervar, og at tað sást á avrikinum. Blaðið vísir á, at Jón Rói var orsøk til frísparkið dygst uttanvert brotsteigin, sum var orsøk til vandamiklastu Viborg royndina ímóti Brøndby málinum.

Í BT fær Jón Rói átta fyri avrikið. Miðal karakterurin verður eisini givin fleiri av viðspælarunum. Einasti Brøndby spælarin, sum fær undir miðal, er Kasper Dalgas. Álopsmaðurin, sum í síni tíð flutti úr OB og til Brøndby fær eitt seks tal. Hann má sigast at vera dømi um spælara, sum dettur niður ímillum, eftir at hann er fluttur úr felagi, har tað hevur gingist honum væl, og til eitt størri felag, har avbjóðingarnar eiga at vera stórar.

### Venjarin nøgdur

Hjá Jón Róa Jacobsen ræður tað um at gera sítt besta, og hjá øllum fótbóltsspælarum hevur tað fyrst og fremst týdning, hvat venjarin heldur um avrikið.

Michael Laudrup smíltist um alt fimmoyrað, tá ið hann hitti pressuna, og hann mundi ikki vera minni fegin, tá ið FCK sunnudagin hevði tapt í Odense:

– Eg kann ikki annað enn vera nøgdur við avrikið hjá mínum monnum. Burtursæð frá síðstu minuttunum høvdu vit alt spælið. Vit spældu okkum til nógvar møguleikar, og samanspælið var gott, tá ið hugsað verður, hvussu tíðliga á árinum vit framvegis eru, og at vøllurin ikki enn er heilt góður. Tá ið teir høvdu fingið eitt mál, vóru okkara eitt sindir strongdir, men tað hevði verið heilt órímuligt, um vit ikki høvdu fingið øll stigini, segði Brøndby venjarin.

18.110 áskoðarar sóu Brøndby leggja seg á odda tveir minuttir undan steðginum. Svenski Mattias Jonson skoraði, og hann átti næstsíðsta fótin, tá ið Peter Foldgast á tímaslagnum økti til 2–0. Viborg minkaði um munin, tá ið tað restaðu sjey minuttir. Stóri spælarin hjá Viborg var annars pólverski málverjin Arek Onyszko.





# Óli brúkti høvdið

**Fleiri enn tíggju túsund sóu Christian Høgna Jacobsen og Vejle leggja rygg til 3–0 tap ímóti einum av oddaliðunum**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*



Sum ikki eina ferð tey seinnu árini, so er tað rumbul í Vejle. Í vikuskiftinum gjørdi maðurin, sum fram um allar hevur arbeitt við at fáa fótbóltsliðið í Vejle aftur at gerast partur av toppinum, av at leggja frá sær. Tað segði hann seg gera, tí ábyrgdarpersónarnir í móðurfelagnum støðugt togaðu í hondbremsuna, sjálvt um felagið fyri nakað síðani samtykti at geva vald frá sær til teirra, sum hava stríðst við at fáa meiri pening til vega. Harvið tykjast møguleikarnir at skapa grundarlag fyri nýggjum superliguliði at gera kámaðir heilt nógv.

Á vøllinum bendir einki á, at Vejle aftur skal gerast partur av superliguni. Fyri at skapa áhuga fyri fótbóltsliðnum í býnum hevði felagið undan vitjanini av Frem sunnudagin gjørt nógv fyri at fáa nógvar áskoðarar í Nørreskógin. Atgongumerkini vóru ókeypis, skipað varð fyri nógvum øðrum undirhaldi enn sjálvum fótbóltinum, og danska várveðrið gjørdi ivaleyst sítt til, at fleiri enn tíggju túsund møttu upp.

Um mongu áskoðararnir fara at koma aftur í Nørreskógin at síggja fótbólt er ein heilt onnur og kanska ivasom søga. Eftir at støðan í steðginum hevði verið 0–0 skoraði Frem trý mál í 2. hálvleiki, meðan heimamenninir einki mál fingu. Harvið er greitt, at Vejle fer ikki at eiga nakran lut í stríðnum um fremstu plássini. Vejle er nummar sjey í næstbestu deildini. Frem er næstfremst, og felagið í Valby, sum hevur gamla Herfølge venjaran, Ole Mørch við stýrisvølin, hevur góðar møguleikar at sleppa upp í part aftur í bestu deildini.

### Óli skoraði

Í Hvidovre høvdu teir fyri bara trimum árum síðani stórar ætlanir um at aftur at taka lut í bestu deildini. Tíðliga í síðsta kappingarári ásannaðu teir, at teir dreymarnir fara ikki at gerast til veruleika. Hvidovre má finna seg í, at tað eru grannafeløgini, Brøndby og Frem, sum eru meiri áhugaverd. Luturin hjá Hvidovre júst nú er at stríðast fyri at sleppa undan niðurflyting til triðju bestu deildina.

Fleiri spælarar eru farnir úr felagnum, og út frá fyritreytunum var tað ikki so galið, at tað eydnaðist at fáa 1–1 á heimavølli ímóti FC Aarhus. Hetta felagið hevur eisini verið eitt av teimum, sum hava havt stórar ætlanir, men eisini hjá teimum snýr tað seg nú um at stríðast fyri at varðveita sessin í næstbestu deildini.

Óli Johannesen var aftur á liðnum hjá Hvidovre, eftir at hann ikki hevði spælt har síðani summarsteðgin í fjør. Og Óli var eyðsýndur. Hann legði Hvidovre á odda, tá ið tjúgu minuttir vóru farnir. Óli stútaði bóltin í málið, eftir at langt innkast varð snittað innfyri málið.

John Heri Dam er eisini í Hvidovre. Hann hevur spælt við í fleiri venjingardystum, men hann var ikki á liðnum ímóti FC Aarhus sunnudagin.

**Danska 1. deild**

| | d | v-j-t | mál | stig |
|---|---|---|---|---|
| 1 Herfølge | 16 | 12-1-3 | 40-23 | 37 |
| 2 Frem | 16 | 10-3-3 | 40-24 | 33 |
| 3 Randers Freja | 16 | 9-3-4 | 35-22 | 30 |
| 4 Skjold | 16 | 8-4-4 | 31-16 | 28 |
| 5 Fredericia | 15 | 7-4-4 | 24-15 | 25 |
| 6 Ølstykke | 15 | 7-4-4 | 38-30 | 25 |
| 7 Vejle | 16 | 7-4-5 | 24-25 | 25 |
| 8 HFK Sønderjylland | 16 | 6-5-5 | 34-29 | 23 |
| 9 B 1913 | 15 | 5-4-6 | 20-26 | 19 |
| 10 FC Aarhus | 16 | 5-3-8 | 26-29 | 18 |
| 11 AC Horsens | 16 | 4-5-7 | 23-28 | 17 |
| 12 Brønshøj | 15 | 4-4-7 | 17-22 | 16 |
| 13 B 93 | 15 | 4-3-8 | 21-27 | 15 |
| 14 Hvidovre | 16 | 3-4-9 | 18-35 | 13 |
| 15 B 1909 | 16 | 2-5-9 | 25-41 | 11 |
| 16 HIK | 15 | 3-2-10 | 15-39 | 11 |


